Umstøðurnar hjá føroyskum langfarafiskimonnum:

Á IFISH-ráðstevnu í Alaska

Anna Maria Simonsen, sum er útbúgvin arbeiðsumhvørvissjú krarøktari, legði fram á IFISH-ráðstevnuni í Alaska eina kanning, hon hevur gjørt av umstøðunum hjá sjófólki í langfarasigling

ARBEIÐSUMHVØRVI
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Í døgunum, 21., 22. og 23. september varð ráðstevna hildin í Sitka á oynni Baranof Island har suðuri í Alaska. Hetta er onnur ráðstevnan, sum ber heitið IFISH, ið stendur fyri International Fishing Industry Safety and Health Conference.

Úr Føroyum vóru Óli Jacobsen, sum er formaður í Føroya Fiskimannafelag og nevndarlimur í IFISH, Pál Weihe, leiðari á Deildini fyri Arbeiðs-og Almannaheilsu og Anna Maria Simonsen, sum er útbúgvin arbeiðsumhvørvissjúkrarøktari. Maðurin hjá Onnu Mariu var eisini við sum fylgjari.

Á ráðstevnuni vóru umboð fyri eitt nú stovnar, arbeiðsgevarar, arbeiðarar og politikarar úr øllum heimspørtum.

Tað er eisini ein gerandisdagur á sjónum. Á ráðstevnu í Alaska herfyri legði arbeiðsumhvørvissjúkrarøktarin, Anna Maria Simonsen, fram eina frágreiðing um umstøðurnar hjá langfarafiskimonnum. - Eg eri ovfarin av tí stóra áhuga henda uppgáva, eg gjørdi í samband við mína útbúgving, hevur fingið, sigur arbeiðsumhvørvissjúkrarøktarin.

Áhugaverd uppgáva

Í mai 2001 tók Anna Maria Simonsen eina útbúgvin innan vinnuheilsusjúkrarøkt. Hon tók útbúgvingina, ið er fyriskipað av Dansk Sygeplejeråd og Universitetinum í Sheffield, sum fjarlestur. Tað var í hesum sambandi, at Anna Maria fór undir at kanna og skriva eina uppgávu um fysisku og sálarligu avleiðingarnar hjá sjófólki av umstøðunum umborð á landfaraskipum.

- Eg skuldi velja mær eitt øki at viðgera, og eg valdi at kanna og skriva um umstøðurnar umborð á langfaraskipum. Hetta var ein lutfalsliga lítil uppgáva, men eg eri stórliga ovfarin av tí áhuga og tí týdningi, sum hetta arbeiði hevur fingið.

Anna Maria sigur, at hetta var eitt øki, sum als ikki hevði verið umrøtt.

- Ymiskt hevur verið frammi um tær vanlukkur, sum henda umborð á langfaraskipum, men eingin hevði sett orð á, hvussu hesi fólk, sum eru so leingi burtur, hava tað, bæði fysiskt og sálarliga.

Hon vísir á, at sjófólk á fjarleiðum eru leingi burtur, røra seg lítið, og summir roykja illa.

Stórur áhugi

Tað var hetta arbeiði, sum hon gjørdi í samband við sína útbúgving, ið Anna Maria legði fram á IFISH-ráðstevnuni í Alaska.

- Saman við frágreiðingini, vísti eg myndir, sum Zacharias Hammer hevur tikið umborð á langfaraskipi undir Eysturgrønlandi.

Hon sigur, at fólk á ráðstevnuni vístu kanningini stóran áhuga, og hon fekk nógvar afturmeldingar um tað arbeiði, sum gjørt er.

Á ráðstevnuni segði Óli Jacobsen eisini nøkur orð um Føroyar og viðurskiftini her við atliti til okkara sjófólk.

Anna Maria sigur, at tað so sanniliga eisini var áhugavert at hoyra frágreiðingar frá umboðum úr menningarlondunum.

- Hóast vit hava okkara vandamál at dragast við, kunnu okkara umstøður ikki samanberast við umstøðurnar hjá sjófólki í menningarlondunum.

Hon vísir á, at har ringast er statt, er torført hjá monnum at fáa reint vatn at vaska fiskin við, og somuleiðis noyðast teir at berjast móti sjóránarum og stríðast móti korruptión.

- So, hesar umstøðurnar kunnu als ikki samanberast við tær, ið okkara sjófólk hevur, hóast vit halda, at nógv kundi verið øðrvísi og betri, sigur Anna Maria.

Samstarv millum lond

Arbeiðsumhvørvisrøktarin veit annars at siga, at evropeisku londini arbeiða við at skipa sonevndar "standardir" innan arbeiðsumstøður á sjónum.

- Samstarvið millum Dansk Sygeplejeråd og Universitetið í Sheffield er ein liður í hesum arbeiði.

Anna Maria Simonsen sigur at enda, at tey, sum taka útbúgving innan arbeiðsumhvørvisrøkt í samstarvi millum Dansk Sygeplejeråd og Universitetið í Sheffield, hava møguleikar at lesa víðari í Sheffield.

Altjóða talvkapping sett

Týsdagin setti borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, talvkappingina 2nd Klaksvík Kjølbro Heilsøla International. Ein talvkapping, har altjóða meistarar telva móti føroyskum telvarum. Harumframt er eisini ein unglingakapping millum føroyskar telvarar

TALV
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

2nd Klaksvík Kjølbro Heilsøla International fór av bakkastokki týsdagin, og telvað verður líka til leygardagin, tá kappingin endar. Fimm føroyingar eru við

Sum navnið á kappingini sigur, so er hetta onnur kappingin av slíkum slagi. Hin var um sama mundi í fjør, og onkrir av altjóða meistarunum ganga aftur. Til dømis er vinnarin av kappingini í fjør, Kim Pilgaard við aftur í ár.

Kappingin í ár verður skipað eftir sama leisti sum í fjør. Tað vil siga, at tað verður telvað tvær ferðir um dagin. Kl. 10 og kl. 15. Men tó so er tað galdandi fyri allar telvararnar, at teir skulu hava minst seks stig út av níggju møguligum fyri at ogna sær ein IM norm. Eitt annað sum er nýtt í ár er, at nú ber til at fylgja hvørjum einstaka talvinum á netinum.

Rani Nolsøe hevur fyrireikað hesa kappingina, og hann fegnast um hendan møguleikan at kunna leggja hvønn einstaka leikin, ið verður fluttur, beinleiðis út á netið.

Í sambandi við at kappingin varð sett týsdagin, varð hetta víst fram. Altjóða dómarin, Mogens Nielsen og nýggi formaðurin í Talvsambandi Føroya, Andreas Ziska, tóku eitt snartalv, meðan hini, ið hjástødd vóru, fóru í eitt annað rúm at hyggja, hvussu leikur fór fram á netinum.

Tá talvið var liðugt var kappingin sett við at borgarstjórin, Steinbjørn Jacobsen, flutti fyrsta leik hjá Kim Pilgaard, og so var klárt at fara í gongd.

Ongin altjóða meistari

Til hetta fyrsta talvið var tað bert Hans Christian, sum telvaði í móti útlendingi. Rani Nolsøe sigur, at Hans Christian var óheppin og tapti.

– Hann kundi havt fingð remis, sigur Rani.

Hinir fýra føroyingarnir telvaðu hvør í móti øðrum, og tað endaði við at Heini og Ólavur vunnu síni talv. Afturat hesum talvunum var eisini unglingatalv. Hetta hava tey gjørt fyri at tey ungu eisini skulu hava ein møguleika til at luttaka í hesi kappingini.

Telvararnir skulu sum sagt telva tvey talv um dagin frá nú av og inntil kappingin endar leygardagin. Ongin av føroysku luttakarunum hava møguleika til at gerast altjóða meistari, tí til tað krevjast tríggir IM normar. Men so harafturímóti so kunnu teir ogna sær ein IM norm og harvið gerast nærri einum altjóða meistaraheitið.

Týsdagin var bert tað eina talvið telva og Heini vann sítt fyrsta

Mynd: Simun á Høvdanum